Frágreiðing til Føroya Løgting

# VÆL GRUNDAÐ VITAN

## Hagtøl og skráir

manntal

# Innihald


**Fororð** ... 3
**Manntal 2011** ... 5
Eyðkenni og týdningur ... 6
Styrkir fólkaræðið ... 6
Betri grundarlag at taka avgerðir ... 6
Mennir møguleikarnar hjá vinnuni ... 6
Mennir gransking ... 6
Eitt altjóða ST-átak ... 6
Lýsir pinkusamfeløg ... 7
Tryggjar breiða grundvitan ... 7
Køvir algongdar rangmyndir ... 7
Veitir áhugafeløgum vitan ... 7
Eggjar til felagsfatan ... 7
Letur ei søguna doyggja ... 7
**Fram móti stórum tøkum** ... 9
Fólkateljing og grundskráir ... 10
Málið er tríggjar almennar grundskráir ... 11
Verandi grundskrá ... 12
Grundskráir, sum ikki eru í Føroyum ... 12
Hjálpiskrá, sum er stovnað ... 12
**Skráir sum amboð hjá fyrisitingini** ... 13
Landsfólkayvirlit ... 14
Býlis- og bygningsskrá ... 14
Virkisskrá ... 15
Landsadressuskrá ... 16
Útbúgvingaryvirlit ... 16
**Demokrati og hagtøl** ... 17
Niðurstøða ... 19
**Tilmæli** ... 21
Landsfólkayvirlit ... 21
Manntal ... 21
Býlis- og bygningsskrá ... 21
Virkisskrá ... 21

# Fororð

Henda frágreiðing lýsir endamálið við fólkateljingini í 2011 og lýsir eina framtíðarmynd, hvussu fólkateljingar í framtíðini kunnu gerast burtur úr almennum grundskráum.

Frágreiðingin nertur eisini við, hvørjir fyrimunir eru at hava vælskipaðar og dagførdar almennar grundskráir. Grundskráir um fólk, virki og býli eru eitt týðandi amboð hjá politisku skipanini og fyrisitingini.

Hagtølini, sum kunnu dragast úr grundskráunum, geva eina væl grundaða vitan um samfelagið. Við hesi vitan ber til at byggja politiskar avgerðir á tryggari grund.

Tørvurin er stórur á hagtølum sum lýsa, hvussu føroyska samfelagið er skrúvað saman.

Manntal 2011 er ein søguligur møguleiki at kortleggja landið í hagtølum. Saman við dagføring av landsfólkayvirlitinum og eini adressuskrá kann manntal verða fyrsta stigið at útvega væl grundaða vitan: léttari at kunna útvega hagtøl og stovna og dagføra almennar grundskráir.

Frágreiðingin vísir eina gongda leið, hvussu vit kunnu útvega neyvari vitan um samfelagið, sum vit liva í.

Fyligskjøl til hesa frágreiðing eru at finna á www.manntal.fo.

Argjum 15. februar 2010

Manntal

# Manntal 2011

Eftir 34 ára steðg verður fólkateljing nú aftur hildin í Føroyum.

Ein fólkateljing gevur ein tvørskurð av samfelagnum, sum í hagtølum lýsir, hvussu vit liva í Føroyum. Hetta eru hagtøl, sum skapa grundleggjandi vitan um Føroyar og kunnu brúkast í politiska arbeiðnum, eins væl og í mongum øðrum høpi.

Síðani seinasta manntal í 1977 hava vit ikki sæð hagtøl um føroysku húskini. Einasti møguleiki í dag at fáa hesar upplýsingar er at fara á gátt hjá øllum í landinum og spyrja.

Týdingarmesta tilfeingið í einum landi eru og verða menniskjuni. At hava vitan um hvørji vit eru, er ein neyðug fortreyt fyri at vita, hvussu eitt nýmótans samfelag skal skipast.

Ein fólkateljing skrásetir neyvt, hvussu samfelagið sær út ein ávísan dag, men longu dagin eftir broytist støðan. Kortini hevur tað týdning at fáa eitt neyvt hagtalsyvirlit, tí so ber til at síggja gongdina í einum samfelag yvir eitt longri tíðarskeið. Í øðrum londum hava fólkateljingar verið minst 10-unda hvørt ár, og tí hevur borið væl til at samanbera frá eini teljing til aðra. Men vit skulu heilt aftur til 1977 til seinasta manntal.

*Fólkateljing lýsir, hvussu vit liva ein ávísan dag. Úrslitið kann brúkast at vísa, hvussu gongdin er í eitt longri tíðarskeið.*

Fólkateljingin 2011 skal geva týðandi upplýsingar um borgararnar, og fer at lýsa demografisku, bústaðarligu og sosialu viðurskiftini hjá okkum øllum nógv meira umfatandi og nágreiniliga, enn vit eru von við.

Bert ein fólkateljing kann geva okkum haldfastar upplýsingar um eitt nú hvørja útbúgving fólk hava, hvørji størv vit hava, hvussu býlisviðurskiftini eru ella hvussu húskini eru samansett.

Í politisku skipanini, í fyrisitingini, í gransking og undirvísing, hjá áhugafeløgum og øðrum, verður víst á tørvin á hagtølum. Á sosiala økinum er stórur tørvur á hagtølum, sum lýsa støðuna í landinum. So at siga eingi hagtøl eru um, hvussu støðan er hjá húskjunum. Í roynd og veru veit eingin, hvussu nógv húski eru í landinum.

Eisini í arbeiðsmarknaðarmálum er tørvur á hagtølum um, hvussu arbeiðsmarknaðurin er settur saman, hvørjir førleikar eru í landinum og hvørjar útbúgvingar føroyingar hava.

Í øllum heiminum verður tað hildið at hava stóran týdning at hava neyv hagtøl um íbúgvar, húski og býli í einum avmarkaðum øki ella einum ávísum aldursbólki. Bert við eini fólkateljing ber til at lýsa viðurskiftini í minstu smálutir, tí komið verið í hvønn krók. Ein fólkateljing finnur eisini sjáldsom fyribrigdi, meðan ein spurnakanning til eitt úrval av landsins íbúgvum ikki røkkur út til hvønn einstakan persón og hvørt hús og hvørja bygd.

ST mælir øllum londum í heiminum til at halda manntal í minsta lagi 10-unda hvørt ár. Helst so nær einum 0-árstali sum til ber.
Bara eini 10-12 lond í heiminum hava ikki ætlan um at halda manntal. Føroyar eru nú á almenna listanum hjá ST yvir lond, sum ætla at halda manntal í 2010-umfarinum.

## *Eyðkenni og týdningur*

### Styrkir fólkaræðið

Ein fortreyt fyri sunnum fólkaræði er vitan. Eitt nú skúli, útbúgving og miðlar eru partar, sum føra vitan inn í samfelagið. Manntal verður eisini ein partur av fólkaræðisligu tilgongdini. Vitan um, hvussu samfelagið veruliga virkar á ymiskum økjum, ger okkum betur før fyri taka lut í fólkaræðinum.

### Betri grundarlag at taka avgerðir

Við at hava nágreinilig hagtøl fyri smá landafrøðilig umráði og smáar samfelagsbólkar, ber til hjá politisku myndugleikunum at taka avgerðir, ið eru próvgrundaðar. Til dømis kunnu avgerðir um betri gagnnýtslu av øllum tilfeinginum í einum landi byggja á væl grundaða vitan.

### Mennir møguleikarnar hjá vinnuni

Vinnulig frambrot byggja á hugskot, og ein fortreyt fyri at menna hugskotini til gevandi vinnu er vitan. Hagtøl úr eini fólkateljing kunnu vísa á ymsar tørvir, ið geva vinnuni nýggjar møguleikar. Hagtøl úr eini fólkateljing geva eisini vinnuni eina mynd av arbeiðsmarknaðinum og verandi førleikum sum heild.

### Mennir gransking

Í fólkaræðishøpi og menningarhøpi, er gransking ein háttur at læra um verandi og kanska framtíðar viðurskifti. Alt granskingarumhvørvið í Føroyum spyr eftir dagførdum hagtølum. Serliga verður hugsað um samfelags- og sosialgransking, har stórur tørvur er á hagtølum. Her er eisini talan um gransking, sum eingin annar kann gera fyri okkum.

### Eitt altjóða ST-átak

Fólkateljingin 2011 er ein partur av eini ST-verkætlan. Altjóða samfelagið undir ST-leiðslu heitir á øll lond um at halda fólka- og býlisteljingar. Endamálið er at fáa eitt yvirlit yvir, hvussu heimurin sær út. ST heitir á lond um at halda fólka- og býlisteljingar 10-unda hvørt ár.
Hendan fólkateljingin verður skipað eftir ST-leisti, so samanberingar við onnur lond verða miðvísari og rættari.

Um vit politiskt velja at lúka ávís altjóða krøv, so eru hagtølini tøk hjá politisku skipanini at arbeiða út frá.

## Lýsir pinkusamfeløg

Eitt er, at vit kunnu samanbera okkum vit restina av heiminum, men vit kunnu eisini vera við at lýsa, hvussu pinkulond eru skipað, og hvat eyðkennir tey. Hetta er vitan, sum bara pinkulond kunnu útvega. Og vit kunnu eisini vísa, at eitt pinkuland megnar at halda eitt manntal og vera partur av altjóðasamfelagnum.

## Tryggjar breiða grundvitan

Úrslitið av einum manntali er óheft. Tað eru hagtøl, sum bara eru har. Tískil er eitt manntal ikki bara sett upp eftir, hvørja nyttu tað hevur við sær her og nú. Har er ein rúgva av grundvitan ella hagtølum, sum í fyrsta lagi kunnu tykjast nyttuleys. Men tað sum í dag er nyttuleys vitan, kann um nøkur ár verða ein fortreyt fyri vitan ella hagtølum, sum vit fáa brúk fyri.

## Køvir algongdar rangmyndir

Har eingin vitan er, noyðast vit at gita ella meta um ella einki siga. Ofta eru myndirnar av veruleikanum, sum vit gera okkum óneyvar ellar beinleiðis skeivar. Misfatan kann vera til at íspinna sleygisøgur. Vit hava hug at flyta vitan um einstøk fólk yvir á fjøldina. Her kann eitt manntal køva tær algongdu rangmyndirnar, sum vit hvør í sínum lagi hava gjørt, ella sum av eini ella aðrari orsøk eru vorðnar góðkendir ”samfelagssannleikar”.

## Veitir áhugafeløgum vitan

Væntandi fara áhugafeløg at taka upplýsingar til sín. Tað veri seg fakfeløg, frítíðarfeløg og annars áhugafeløg av ymsum slag. Bæði fyri at lýsa egin áhugamál, men eisini fyri at sannføra politikarar um at hyggja eftir veruligu støðuni, tá lógir skulu smíðast.

## Eggjar til felagsfatan

Manntal kemur eisini fram við upplýsingum, sum geva okkum eina grundleggjandi felagsfatan – um hvørjum felags karmi vit virka í. Fólkatalið vita vit, og tað gevur okkum eina „vit“-kenslu. Men eisini onnur grundleggjandi tøl geva okkum – kanska eina ótilvitaða „hetta-eru-vit“-kenslu. Eitt manntal loysir ikki gátuna, hvussu nógvir føroyingar búgva uttanlands, men tað er eitt tal, sum flest øll hava gitt um ella sagt okkurt um. Tí tað hevur eisini okkurt „vit“ í sær. Á sama hátt kunnu vit ímynda okkum, at grundleggjandi tøl geva eina „vit“-kenslu, eitt nú, hvussu nógv húski eru í Føroyum, ella hvussu nógv búgva í egnum húsum. Eitt manntal kann eisini geva eina „vit“-kenslu í eini bygd ella í einum aldursbólki.

## Letur ei søguna doyggja

Eitt manntal lýsir eitt ávíst tíðarskeið í søguni fyri okkara eftirkomarum. Vit kunnu siga, at talan er um eina løtumynd av samfelagnum – sum ein familjumynd, sum verður stuttligari og meiri spennandi, sum tíðin líður. Í gomlum fólkateljingum síggja vit, hvussu nógvar arbeiðskonur vóru í teimum ymsu húskjunum. Kanska fer onkur um 100 ár at undra seg yvir, hvar arbeiðskonurnar blivu av – ella kanska eru tær enn onkustaðni.

# Fram móti stórum tøkum

Nógv tey flestu ST-londini halda fólkateljingar, men ikki øll gera tað eftir tí siðbunda leistinum, har farið verður í hvørt hús at spyrja.

Gongdin er, at fleiri og fleiri lond royna at stovna og viðlíkahalda almennar grundskráir, sum kunnu vera grundarlag undir fólkateljingum í framtíðini.

Í kostnaði er sera stórur munur á at kunna draga hagtøl úr skráum og at skulu út í hvørt hús at spyrja.

Seinastu ferð fólkateljing varð hildin í Danmark við at vitja hvørt hús, var í 1970. Danmarks Statistik, sum skipaði fyri fólkateljingum bæði í Danmark og Føroyum, gjørdi eina fólkateljing afturat í Føroyum í 1977.

Í Danmark hevur síðani 1970 borið til at gera fólkateljingar burtur úr ymsum almennum grundskráum. Eisini í hinum stóru Norðurlondunum verða fólkateljingar gjørdar við at draga hagtøl burtur úr verandi grundskráum.

Tó er vert at nevna, at tað altíð fara at vera upplýsingar og hagtøl, sum bert fáast við at spyrja fólk.

Summi hagtøl kunnu gerast út frá spurnakanningum, har eitt úrval av fólki verður spurt. Men í hagfrøðini er greitt, at upplýsingar sum verða savnaðar við úrvalskanningum, ikki lýsa viðurskiftini í smáum økjum og hjá smáum fólkabólkum á sama hátt sum ein fólkateljing.

Hagstovan ger tey mest átrokandi hagtølini í Føroyum. Men breiðar lýsandi fólkateljingar ber bara til at gera í Føroyum við at fara út í hvørt hús við spurnablaði.

Í Føroyum eru ikki tær neyðugu almennu grundskráirnar, sum skulu til fyri at kunna gera fólkateljingar burtur úr skráum.

Vit hava higartil tvær av teimum trimum grundskráunum, sum eru neyðugar fyri at kunna gera fóllkateljingar burtur úr skráum. Tær báðar eru landsfólkayvirlitið og landsadressuskráin.

## *Fólkateljing og grundskráir*

Eitt stórt tak er at koma fram til eina støðu, har tað ber til at gera fólkateljingar burtur úr grundskráum.

*Stóra átakið nertur við fleiri aðalráð, fleiri stovnar og allar kommunur.*

Men fyritreytin er at stovna tær neyðugu skráirnar og finna fram til, hvør skal umsita tær. Hetta arbeiði nemur við nógvar stovnar og fleiri aðalráð. Kommunurnar eru sera týðandi partur í hesum, tí tær eru so nær borgaranum, og tí kommunurnar uttan iva verða við til at umsita grundskráirnar. Hetta krevur góða leiðslu og samskipan.

Landsstýrismenninir í fíggjarmálum og innlendismálum løgdu í februar 2007 upprit fyri Landsstýrið, har málini vóru sett upp.

2. februar 2007 tók landsstýrið undir við uppritinum.
Sagt verður millum annað:

*Uppritið til landsstýrið bað bæði um fólkateljing og um almennar grundskráir.*

Aðalráðini og stovnarnir eru sinnað at fara undir at fremja hesa fyrstu føroysku fólka- og bústaðateljingina og samstundis at menna almennu fyrisitingarligu skráirnar, sum saman við hagtølum eru avgerandi fortreyt fyri próvgrundaðum politikki.

Fólkateljingarátøk eru fyrst og fremst hagfrøðiligar teljingar. Men uttan góða grundleggjandi almenna skráseting í t.d. fólkayvirlit og adressuskrá, er nyttan av fólkateljingum munandi skerd. Tí mæla vit til eitt fólkateljingarátak, sum er samskipað við eitt átak til at fáa álítandi skráseting í fólkayvirlitið, at fáa allar íbúðir skrásettar og at fáa samanknýtt býlisskrá, adressuskrá og fólkayvirlit.

Verður farið fram eftir hesum leisti, verða ikki bara almennu skráirnar meira eftirfarandi, tí haraftrat fer nógv betur at bera til at fáa góð fólka- og sosialhagtøl millum fólkateljingarárini, grundað á fyrisitingarligu skráirnar og fólkateljingarúrslitini.

At almennu fyrisitingarligu skráirnar verða eftirfarandi, hevur stóran týdning fyri kostnaðin og tryggleikan í bæði almennari umsiting og privatum fyritakssemi. Neyv skráseting av borgarum á adressur, hevur týdning fyri allar almennar stovnar, sum skulu í samband við borgaran, so sum skattamyndugleikan, Almannastovuna, løgregluna, ambulansutænastuna og sjúkrahúsið, postverkið, sløkkiliðini og fleiri aðrar. Somuleiðis hevur skrásetingin stóran týdning fyri bankar og sparikassar, trygging og aðrar privatar fyritøkur, sum hava tørv á at kenna rætta bústaðin.

Fyri hagtalsvirksemið fara hesar almennu skráirnar at vera eitt stórt stig framá. Síðani seinastu fólkateljingina í 1977, hava vit ikki sæð hagtøl um føroysku familjurnar, men tá persóns- og adressuskráir eru fingnar upp á pláss, fer tað at bera til regluliga at lýsa familjuna í hagtølunum. Hetta merkir, at samfelagsliga býtið og onnur sosial viðurskifti tá kunnu gerast upp á familjur og ikki bara persónar. Kor hjá serligum samfelagsbólkum, sum t.d. støkum uppihaldarum, pensjónistafamiljum ella barnafamiljum fara tá at verða sjónlig og kunnu leggjast til grund undir politiskum og samfelagsligum orðaskifti.

## Málið er tríggjar almennar grundskráir

Skulu fólkateljingar í framtíðini gerast burtur úr grundskráum, verður neyðugt við trimum grundskráum í fyrisitingini.

Grundskráirnar eru tær tríggjar um fólk, býli og virkir. At vit kalla tær grundskráir er tí, at tær hvør sær lýsa sjálvar eindirnar – fólk, býli og fyritøkur – og ikki hendingar, so sum skattagjaldingar, veitingar og annað. Harafturat kemur ein adressuskrá, sum er ein hjálpiskrá, ið samstundis er ein av nógvu eyðkennunum í grundskráunum. Tað vil siga, at umvegis adressuskránna ber til knýta tær tríggjar grundskráirnar saman.

*Málið er í framtíðindi at kunna gera fólkateljingar burtur úr almennum grundskráum.*

Fyrisitingarligar skráir eru allar tær skráirnar, sum tað almenna hevur um okkum borgarar og fyritøkur, har upplýsingarnar í mestsum altíð eru skjalfestar í málsviðgerð.

Hagtalsskráir eru ikki í sama mun skjalfestar í málsviðgerð, men kunnu í stóran mun vera estimat um hendingar og eindir.

Av teimum trimum grundskráunum hava vit í dag eitt landsfólkayvirlit. Harafturat krevst ein býlis- og bygningsskrá og ein virkisskrá. Hesar báðar seinnu eru ikki í Føroyum í dag.

Málið er at koma fram til hesa støðuna, har tær tríggjar grundskráirnar eru fullfíggjaðar og verða viðlíkahildnar.




*Tær tríggjar grundskráirnar um eindirnar í samfelagnum eru grundarlagið fyri eini munagóðari hagtalsskipan, umframt at vera at amboð hjá politisku skipanini og fyrisitingini.*

| *Verandi grundskrá* | | | |
|---|---|---|---|
| **Navn** | **Innihald** | **Rakstur og viðlíkahald** | **Umsiting** |
| **Landsfólka-yvirlitið** | Allir íbúgvar eru skrásettir í landsfólkayvirlitinum. Íbúgvarnir eru skrásettir við p-tali. | Kommunurnar skráseta til- og fráflyting. Ljósmøður, læknar, prestar, fútaskrivstovan o.o skráseta føðd og deyð. | Innlendismálaráðið (Umhvørvisstovan) |

| *Grundskráir, sum ikki eru í Føroyum* | | | |
|---|---|---|---|
| **Navn** | **Innihald** | **Rakstur og viðlíkahald** | **Umsiting** |
| **Býlis- og bygningskrá** | Øll býli og allir bygningar eru skrásettir við ymsum upplýsingum: t.d. slag av bygningi, vídd, upphiting, byggiár, tilfar o.a. | Helst kommunurnar | Umhvørvisstovan? |
| **Virkisskrá** | Øll virki, fyritøkur og stovnar eru skrásett við ymsum upplýsingum: t.d. vinnugrein, tal á arbeiðsfólkum o.a. | ? | TAKS? |

| *Hjálpiskrá, sum er stovnað* | | | |
|---|---|---|---|
| **Navn** | **Innihald** | **Rakstur og viðlíkahald** | **Umsiting** |
| **Landsadressu-skráin** | Allar bygdir og allir býir hava góðkend veganøvn við tilhoyrandi húsanummrum. Samstundis er eitt L-tal knýtt til hvørja adressu. | Kommunurnar | Innlendismálaráðið (Umhvørvisstovan) |

# Skráir sum amboð hjá fyrisitingini

Umframt at almennar grundskráir kunnu brúkast til fólkateljingar í framtíðini, eru góðar og álítandi almennar grundskráir eitt sterkt og virkið amboð at menna føroyska samfelagið og fylgja við, hvussu gongdin er.

Grundskráir eru eitt amboð hjá fyrisitingini og politisku skipanini at stýra eftir.

*Grundskráir styðja undir, at politiskar og fyrisitingarligar avgerðir byggja á vitan.*

Samtyktin í Landsstýrinum í februar 2007 segði, at Føroyar skuldu arbeiða fram móti eini skipan við grundskráum, sum bæði vóru hent hjá fyrisiting og sum vóru grundarlagið undir hagtølum.

Grundskráirnar eru eitt slag av undirstøðukervi við upplýsingum um tann einstaka. Hesar upplýsingar verða brúktar at stýra skyldum og rættinum hjá tí einstaka.

Upplýsingar verða innheintaðar, goymdar og latnar øðrum, sum hava rætt til og brúk fyri teimum upplýsingum, sum eru í almennu grundskráunum. Talan er um upplýsingar um fólk, býli og bygningar og virki. Privatar fyritøkur og onnur hava eisini gleði av upplýsingunum í skráunum.

Alt samfelagið (politikarar, fyrisiting, granskarar, undirvísing, borgarar o.o) fáa dagførda vitan um landsins íbúgva- og býlisviðurskifti. Samstundis fær politiska skipanin eitt betri upplýsingargrundarlag at gera og eftirmeta politiskar ætlanir við.

*Grundskráirnar eru partur av fyrisitingini og skulu viðlíkahaldast í fyrisitingini.*

At almennu fyrisitingarligu skráirnar eru eftirfarandi, hevur stóran týdning fyri kostnaðin og tryggleikan í bæði almennari umsiting og privatum fyritakssemi.



Samanumtikið eru allar grundskráirnar ein partur av fyristingini og tað er í fyrisitingini, at upplýsingarnar verða dagførdar.

Ein annar fyrimunur við dagførdum grundskráum er, at øll kunnu fáa eitt samanhangandi yvirlit yvir tær upplýsingar, sum tað almenna hevur um tey og kunnu tryggja, at hesar upplýsingar eru rættar.

Burtur úr dagførdum grundskráum ber til at draga hagtøl, sum kunnu styðja undir, at politiskar avgerðir ella avgerðir í fyrisitingini byggja á vitan.

Summi lond – millum onnur tey stóru Norðurlondini – hava fleiri almennar grundskráir, og sleppa sostatt undan at halda vanligar fólkateljingar. Í Føroyum kann Hagstovan í framtíðini eisini gera fólkateljingar beinleiðis burtur úr fyrisitingarligum skráum.

Granskarar fáa betri grundarlag at menna vitan um føroysk viðurskifti, ið millum annað kann nýtast hjá politisku skipanini.

Tað er eisini avgerandi, tá grundskráir skulu brúkast til hagtøl, at tær verða viðlíkahildnar. Hetta ber bara til, um onkur hevur brúk fyri skráunum og sær sín fyrimun at viðlíkahalda tær.

## *Landsfólkayvirlit*

Í dag er tað Umhvørvisstovan undir Innlendismálaráðnum, sum hýsir Landsfólkayvirlitinum og landsadressuskránni.

Viðlíkahaldið av landsfólkayvirlitinum fer fyrst og fremst fram í kommununum, sum skráseta, hvør flytur í og úr kommununi. Harafturat eru ljósmøður, læknar, prestar, fútaskrivstovan o.o. sum skráseta føðd og deyð, vígd og skild.

Landsfólkayvirlitið mennir nú og verksetir eina nýggja KT-skipan og nýggjar mannagongdir. Í nýggja landsfólkayvirlitinum skal tryggjast, at upplýsingarnar um íbúgvarnar eru rættar og verða dagførdar á skilabesta hátt. P-tal og góðkendar adressur í landsadressuskránni skulu knýtast saman.

Mannagongdir skulu gerast um, hvussu hetta knýtið kann viðlíkahaldast. Skipanin skal gerast soleiðis, at Hagstovan lætt kann nýta upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum í síni framleiðslu av sosial-hagtølum. Hagstovan eigur eisini at kunna gera hagtøl burtur úr øðrum serskráum eitt nú á heilsu-, almanna-, og útbúgvingarøkinum.

Arbeiðið at dagføra Landsfólkayvirlitið og knýta tað saman við eina landsadressuskrá er í gongd.

## *Býlis- og bygningsskrá*

Verður ein býlis- og bygningsskrá stovnað, fer tað at stuðla arbeiðnum hjá miðfyrisitingini og kommununum. Um væl verður atborið eiga privatar fyritøkur at kunna fáa gagn av einari slíkari skrá. Hagstovan kann eisini draga ymisk sosialhagtøl burtur úr eini býlis- og bygingsskrá.

*Kommunurnar fara ivaleyst at hava avgerandi leiklut at umsita eina býlis- og bygningsskrá.*

Ein býlis- og bygningsskrá er eitt yvirlit yvir øll býli og allar bygningar. Í skránna ber til at knýta upplýsingar sum hvussu bygningurin verður upphitaður hvør orka verður brúkt, hvussu er bjálvað, umframt vanligar upplýsingar, sum stødd og vídd osv.

Uttan iva fara kommunurnar at hava ein avgerandi leiklut í at uppbyggja

og viðlíkahalda eini býlis- og bygningsskrá. Kommunurnar eru byggimyndugleiki og allar umsóknir um bygging fara gjøgnum kommunurnar. Tá ein býlis- og bygningsskrá er stovnað, kann hon viðlíkahaldast við teimum upplýsingum, sum kommunurnar fáa í byggimálum.
Hvussu hetta skal skipast nærri, er ikki avgjørt.

## Virkisskrá

Búskaparliga virknu eindirnar í landinum kunnu við einum vissum rætti sigast at vera tvær: íbúgvarnir og fyritøkurnar. Landsins íbúgvar eru skrásettir í landsfólkayvirlitinum, og fyritøkurnar eiga at vera skrásettar í einari virkisskrá.

Ongin rættulig virkisskrá er í landinum, sum á fullfíggjaðan hátt vísir fyritøkur og aðrar búskaparligar grundeindir í landinum. Fleiri viðskiftaskráir finnast, sum eru lagaðar til egnan tørv hjá teimum, sum eiga tær. Men eingin teirra kann kallast virkisskrá, sum eru skipaðar sum tær í grannalondunum.

*Ein virkisskrá hevur bæði týdning hjá almennum myndugleikum og privatum fyritøkum.*

Almennar upplýsingar um fyritøkur og aðrar búskaparligar grundeindir skulu verða tøkar í eini almennari virkisskrá. Virkisskráin skal vísa fyritøkurnar sum fíggjarligar eindir og sum vinnuligar virkiseindir eftir minst líka góðum standardiseraðum reglum, sum tær í grannalondunum.

TAKS hevur í dag eina virkisskrá. Besti hátturin at menna eina almenna virkisskrá er uttan iva at brúka upplýsingarnar í skránni hjá TAKS sum grundarlag. Eisini tí at tað er sannlíkt, at TAKS verður heimstaður hjá eini komandi virkisskrá.

Núverandi skráin hjá TAKS er mest at kalla ein skrá yvir viðskiftafyritøkur allar stovnar í landinum.

Ongar lógir eru galdandi fyri skránna hjá TAKS. Lógir sum lýsa skyldur og rættindi hjá borgarum, fyritøkum og skrásetingarmyndugleikum í sambandi við skráseting.

Tí er skráin, sum hon er í dag, ikki nóg neyv til eina almenna virkisskrá. Ein almenn virkisskrá skal virka sambært altjóða reglum og eftir norðurlendskum mynstri.

Verður bøtt um TAKS-skránna, ber til at fáa eina almenna virkisskrá, sum bæði er grundarlag undir hagtølum og gerst ein fyrisitingarlig skráseting av fyritøkum og fíggjarligum eindum.

Eins og íbúgvaskráin má virkisskráin eisini vera í hondunum á einum almennum myndugleika, sum dagførir upplýsingarnar í skránni, sum verða fingnir til vegar frá teimum, sum eiga fyritøkurnar.

Virkisskráin er til nyttu hjá almennum myndugleikum – t.d. skattaverki og arbeiðseftirliti – men eisini hjá privatum fyritøkum – t.d. tryggingarfeløgum og peningastovnum. Ikki minst týdning hevur hon fyri hagtalsvirksemi, tí fyritøkurnar hava minst líka stóran týdning í hagtølunum sum borgarar landsins.

## Landsadressuskrá

Landsadressuskráin er eitt yvirlit yvir allar adressur í landinum. Landsfólkayvirlitið hýsir skránni. Í øllum kommununum eru nú góðkendar og skrásettar adressur. Øll hava vit javnan brúk fyri at vita nágreiniligan bústað hjá onkrum. Neyv skráseting av adressum hevur týdning fyri allar almennar stovnar, sum skulu í samband við borgaran, so sum skattamyndugleikin, Almannastovan, løgreglan, Posta, ambulansutænastan og sjúkrahúsið, sløkkiliðini og fleiri aðrir stovnar.

Somuleiðis kann ein felags almenn adressuskrá hava týdning fyri privatar fyritøkur, sum hava tørv á at kenna rætta bústaðin. Við eini almennari adressuskrá sleppa fyritøkur undan at viðlíkahalda egnar skráir. Tað verður bíligari og skuldi eisini havt færri villur við sær.

*Ein landsadressuskrá skal knýtast saman við Landsfólkayvirlitinum.*

Arbeitt verður við at finna eina skipan at viðlíkahalda adressuskránna, so allar kommunur hava somu mannagongdir. Hvussu verður gjørt, tá hús hvørva, nýggj hús verða bygd, ella hús verður umbygt til fleiri býli.

Eisini er arbeiðið at knýta góðkendu adressurnar at persónunum í Landsfólkayvirlitinum farið í gongd.

Í framtíðarmyndini verður landsadressuskráin ein háttur at knýta tær tríggjar grundskráirnar saman.

## Útbúgvingaryvirlit

Á einum manntali fæst eitt yvirlit yvir útbúgvingar, førleikar og størv. Hetta verður ikki ein grundskrá, men yvirlitið, sum fæst á manntalinum, kann brúkast til hagtøl. Umhugsast eigur eisini, um upplýsingar um útbúgving kunnu knýtast upp í upplýsingarnar í landsfólkayvirlitinum.

# Demokrati og hagtøl

Politikkur miðar fyri ein stóran part eftir at skifta ríkidømi, vælferð, almennar tænastur og veitingar millum borgarar, so at úrslitið so ella so er rættvíst. Men til at fáa eina hóming av, hvussu vælferðin er skift millum húskini, krevst kunnleiki um standin manna millum. Hesin kunnleiki kemur fyri mesta partin frá hagtølum.

Tí er tað so avgerandi neyðugt, at so stórur partur av fíggjarligu og sosialu viðurskiftunum sum gjørligt verður skrásettur í tíðarhóskandi talgildar skráir. Á tann hátt kunnu fyrisitingin, politiska skipanin og upplýsti almenningurin fáa innlit í, hvussu samfelagsligi standurin er.

Sosialu myndugleikarnir, skattamyndugleikarnir, heilsumyndugleikar, skúlafyrisitingin og flestu almennu stovnar og kommunur skráseta veitingar, skattagjaldingar, lønir, sosial tiltøk og mangt annað, sum kann geva okkum kunnleika um, hvussu tilfeingi landsins er skift borgaranna millum.

Men hví verða so allar hesar upplýsingar ikki til hagtøl?
Ein av orsøkunum er, at hagtalsligu grundskráirnar ikki eru til, ella ikki eru í nóg góðum standi.

Tær mest avgerandi tvær grundskráirnar eru tær um borgarar landsins og um fyritøkur landsins. Av tí at hesar báðar ikki eru í nóg góðum standi, ber yvirhøvur ikki til at gera nógv av teimum hagtølunum, sum millum onnur Løgtingið so harðliga hevur brúk fyri, til at síggja sosiala og búskaparliga standin í samfelagnum.

Føroya Løgting er í tí støðu, at tað ber ikki til hjá lóggevandi myndugleikanum at miða seg eftir kunnleikanum um, hvussu standurin er, tá umræður viðurskiftini hjá børnum og foreldrum teirra. Og hetta er tíverri galdandi fyri so gott sum allar aðrar sosialar spurningar, sum Løgtingið hevði spurt Hagstovuna um.

Tað ber snøgt sagt ikki til at leggja politikk til rættis um sosial viðurskifti, sum byggir á væl grundaða vitan - „Evidence based policy“, sum tað verður kallað á enskum máli.

### Dømi um væl grundaða vitan

Til at lýsa hetta evni kunnu vit nevna korini hjá børnunum.
Kemur eitt mál fyri Løgtingið har skotið verður upp at stuðla støkum uppihaldarum, verður neyðugt hjá løgtingslimum at vita, hvussu fíggjarliga støðan er hjá støkum uppihaldarum. Og hava løgtingsfólk hug at fáa vitan, um tað er stórur munur á teimum sosialu korum, sum børn hjá støkum uppihaldarum og børn í øðrum familjum liva undir, so eru hagtøl neyðug.

Upplýsingarnar eru millum annað at finna í skráunum um skatt og inntøkur hjá TAKS og um veitingar hjá Almannastovuni. Og so skuldi alt verið í lagi, heldur tú.

Men so einfalt er tað ikki, og vit skulu her nevna tvey fyribrigdi, sum forða okkum at fáa røttu myndina av korunum hjá børnum í heimunum.

Av tí, at eingin grundskrá er, sum vísir, hvørji fólk ið búgva saman í húskjunum, og í hvørjum býli tey búgva, ber ikki til at hava væl grundaða vitan um, hvørjum korum børn og foreldur húsast.

Í øllum grannalondum okkara er vitanin tøk um tann einstaka, um hvørjum hann býr saman við, og hvussu bústaðurin er.

Spyr Løgtingið í dag Hagstovuna um inntøkuviðurskifti, bústaðarviðurskifti ella viðurskifti verjanna/foreldranna at børnunum, so fæst einki svar. Tí upplýsingarnar finnast ikki.

Viðurskiftini at leggja politikk til rættis eftir kunnleika um aktuellu støðuna eru ikki góð.

Tørvur á kunnleika er ikki bara trupulleikin hjá Løgtinginum. Sama er galdandi fyri fyrisitingina, sum skal tæna landsstýrisfólkum at smíða lógaruppskot. Sama tvørleika møta teir myndugleikar, sum eru settir at ansa lógum og fyriskipanum og at seta tær í verk.

Almenningurin og fjølmiðlar, sum áttu at havt møguleikan at fylgja við í viðurskiftunum, sleppa heldur ikki fram at upplýsingunum, tí teir eru ikki til. Onki demokratiskt eftirlit verður tí, sum grundað á kunnleika letur veljaran taka støðu til málini, tá politikarar skulu veljast. Fjølmiðlarnir hava heldur ikki møguleikan at fylgja við, um politikkurin er væleydnaður ella miseydnaður.

## Niðurstøða

Møguleikin hjá tí einstaka at vera við í demokratisku prosessini er alt meira avgerandi tongdur at møguleikanum at fáa rættvísandi upplýsingar um, hvussu veruleikin sær út.

Hetta er galdandi fyri løgtingslimir, fyrisiting og almenningin allan.
Veruleikin er ein fløkjasligur ruðuleiki av stakpettum. Tí eigur hann at lýsast í standardiseraðum, konsistentum og komparativum hagtølum, sum eru grundað á drúgvu norðurlendsku og altjóða royndirnar.

Hava øll sama góða grundarlag av kunnleika um viðuskiftini, er vegurin til semju munandi lættari. Og vegurin til semju er samstundis vegurin til eitt betri samfelag, sum øll hava møguleika at meta um og taka støðu til.

Er stórur ivi um, hvussu viðurskiftini eru, tí at ongar upplýsingar eru tøkar, fara vit at gita hvør í sínum lagi. Og gitingar eru verri grundarlag enn fákunn. Ikki at vita er nóg galið, men tá partarnir í málinum gita hvørt sítt um veruleikan, er skjótari at grava skotgravir, heldur enn at røkka semju.

Tað, sum tann sterkasti gitir, verður ofta til almennan „sannleika“. Tann sterkasti er hann, sum til hvørja tíð røkkur longst í fjølmiðlunum og í politikkinum.
Øll eru vit samd um, at vit vilja vita og ikki bara gita. Politikarar, fyrisiting, fjølmiðlar, fakfólk – øll vilja sleppa at grunda avgerðir og metingar á væl grundaða vitan um sonnu viðurskiftini.

Vegurin fram á tað málið gongur fyri stóran part gjøgnum hagtalsheimin. Pinkulandið kann saktans bara hava pinkuhagtøl, men tá røkka vit ikki fram at kunningarsamfelagnum og vitanargrundaðum avgerðum. Skulu vit virka á sama hátt sum nútímans grannasamfeløgini, so mugu vit hava betri vitanargrundarlag.

Og betri hagtøl.

Tey fakfólk, sum landið hevur sett at veita almenn hagtøl og kunnleika um einstøku fakøkini í fyrisitingini, kunnu saktans røkka longur – nógv longur – við somu arbeiðsorku, um fólkateljingar verða framdar og grundskráirnar gjørdar.

# Tilmæli

Fleiri átøk skulu gerast fyri at røkka visjónini og endamálinum í hesum skjali. Summi átøk eru í gongd, meðan summi mál kunnu røkkast næstu árini.

## Landsfólkayvirlit

Arbeiðið at dagføra og menna nýtt landsfólkayvirlit heldur fram í sambandi við, at landsfólkayvirlitið skal lúka krøvini í løgtingslóg nr. 41 frá 8. mai 2007 um fólkayvirlit. Elektroniska skipanin er mett til at kosta í alt 2,7 mió kr. Í 2010 verða brúktar 1,1 mió kr., og í 2011 skulu brúkast 1,6 mió kr. Umframt umsiting eru tøkniligu rakstrarútreiðslurnar hjá Umhvørvisstovuni av Landsfólkayvirlitinum umleið 250.000 kr. árliga. Kommunurnar og onnur luttaka eisini í umsitingini av Landsfólkayvirlitinum.

## Landsadressuskrá

Arbeiðið at menna og verkseta landsadressuskránna heldur fram. Alt landið hevur fingið góðkendar adressur, men enn er eftir at gera eina viðlíkahaldsskipan í kommununum. Landsadressuskráin skal lúka krøvini í løgtingslóg nr. 17 frá 6. mars 2002 um adressur. Roknast kann við, at Landsadressuskráin skal útbyggjast fyri umleið 300.000 kr. um árið tey næstu fýra árini.

## Manntal

Arbeiðið at halda manntal í 2011 heldur fram. Umframt víðfevnd hagtøl, so fæst eisini ein nágreinilig kunning um støðuna á íbúgva- og býlisøkinum. Hetta eru upplýsingar, sum politiska skipanin, gransking, vinna, miðlar og borgarar kunnu brúka.

Gjørd verður serstøk lóg um manntal 2011, sum tryggjar trúnað og tagnarskyldu og sum tryggjar, at upplýsingar ikki verða brúktar til annað enn hagtøl. Í ár kostar manntal 3 mió kr. Næsta ár, tá sjálv teljingin verður, er kostnaðurin mettur til 6 mió kr. Viðgerð og almannakunngerð av úrslitinum í 2012 verða mett at kosta 2 mió kr.

## Býlis- og bygningsskrá

Mælt verður til at fara undir fyrireikandi arbeiði at stovna eina býlis- og bygningsskrá. Umframt at stuðla arbeiðnum hjá miðfyrisitingini og kommununum, fer ein býlis- og bygningsskrá at styrkja møguleikarnar at gera álitandi hagtøl. Samlaða verkætlanin er mett at kosta 3 mió kr.

## Virkisskrá

Mælt verður til at fara undir fyrireikandi arbeiði at stovna eina virkisskrá, sum er tann triðja grundskráin. Ein virkisskrá eigur at byggja á verandi viðskiftaskrá hjá TAKS. Saman við hinum báðum grundskráunum – landsfólkayvirlitinum og eini býlis- og bygningsskrá – fæst fullfíggjaða grundarlagið fyri at kunna gera hagtøl burtur úr skráum. Samlaða verkætlanin er mett at kosta 3 mió kr.

manntal

*Manntal er verkætlan undir Hagstovuni, sum skal skipa fyri fólkateljingini í november 2011.*

*Samskipari: Heini Hátún, heini@manntal.fo*

*www.manntal.fo*